

## Godt fiskedøgn

Norska FiskeribladetFiskaren veit at siga, at sildafiskiskapurin hjá norskum skipum hevur verið rímiliga góður seinastu dagarnar. Prísirnir á norðhavssild hava ligið úr 2,27 upp í 3,82 norskar krónur – alt eftir støddini á sildini. Tað vísir seg, at størsta sildin fæst vestari á. Skipini, sum hava roynt vestanfyri Lofoten, hava fingið ta størstu sildina. Eisini tey skip, sum hava fiskað longu norðuri á leiðunum og nærri landi, hava eisini havt hampiligan góðan fiskiskap. Eitt av norsku sildaskipunum, Herøyhav, læt í morgun frætta, at teir høvdu 1.100 tons av sild inni.

# Bíða eftir kappingar-ráðnum

**Størstu íslendsku dagbløðini, ókeypisblaðið, Frettablaðið, og gjaldsblaðið, Morgunblaðið, fara frameftir at verða rikin undir sama hatti – um kappingarráðið góðkennir samanleggingina**

**Reykjavík:** Tað hevur leingi verið ávegis, men nú hevur kreppan gjørt tað tvingandi neyðugt hjá størstu dagbløðunum í Íslandi, at leggja saman.

- Bløðini hava í longri tíð verið rikin við undirskoti, og tí hevur tað leingi ligið í luftini, at tey skuldu leggja saman fyri at spara upp á útreiðslurnar, sigur Camilla Aradóttir, sum starvast sum blaðkvinna á Morgunblaðnum.

Tað verður tó framhaldandi talan um tvey ymisk, sjálvstøðug dagbløð redaktionelt, men ætlanin er at útnytta felags funktiónir so sum útbering og prenting.

Talan verður sostatt um somu eigarar av báðum bløðunum við teimum sparingum, sum ein felags umsiting eisini kann bjóða.

- Tað hevur verið tosað um hesa samanleggingina í fleiri mánaðir, tí tað hevur verið neyðugt at spara upp á útreiðslurnar. Nú hevur kreppan so gjørt, at tað er tvingandi neyðugt, at samanleggingin hendir her og nú, sigur Camilla Aradóttir.

### 24stundir niðurløgd

Tað, at Frettablaðið nú er lagt saman við Morgunblaðnum, hevur ført við sær, at ókeypisblaðið hjá Morgunblaðnum, sum nevndist 24stundir – eitt systurblað til danska blaðið 24timer – nú ikki er til longur.

- Tað blaðið er niðurlagt, at tað hevur havt tær keðiligu avleiðingar, at 22 fólk eru søgd úr starvi í síðstu viku, sigur Camilla Aradóttir.

Men Frettablaðið og Morgunblaðið fara so at halda fram sum sjálvstøðug dagbløð, og nú verður bert bíðað eftir, um kappingarráðið góðtekur samanleggingina, serliga tí talan er um eina samanlegging millum landsins størstu dagbløð.

Camilla Aradóttir sigur, at tilsamans arbeiða eini 90 fólk á Morgunblaðnum, íroknað myndafólk og layout fólk. Hartil koma so prentarar og onnur starvsfólk á prentsmiðjuni, so tilsaman metir hon, at eini 110 til 120 fólk starvast á Morgunblaðnum.



at íslendingar sjálvir sleppa sum frægast burtur úr støðuni.

### Vit reisa okkum aftur

Forsætismálaráðharrin, Geir Haarde, hevur hildið dagligar tíðindafundir alla síðstu viku eftir at tað koma fram, at Landsbankinn fór á heysin – 6. oktober av øllum døgum.

- Men har er einki nýtt at frætta. Eg haldi meiri tað er hansara máti at vísa, at hann er har, og at hann stillar upp til spurningar. Men nógv nýtt er ikki at hoyra. Vit hava faktisk tosað um, at hann er betri á enskum enn á íslendskum, og so er spurningurin bara, um útlendsku miðlafólkini duga betur at seta spurningar enn vit, sigur Camilla Aradóttir.

Ísland hevur nógv tey seinastu árini havt stóran áhuga kring um í heiminum. Og tað hevur tað enn, men nú kanska meiri við mótsattum fyritekni.

- Ja, tað er eitt sindur undarligt. Tað plagdi at vera ein kensla av misunnilsi, men nú er tað meiri soleiðis: har fingu tit tað. Tað er sjálvandi ikki hugaligt at fólk síggja okkum i einum negativum ljósi nú, meðan allir íslendingar síðsta ár skuldu vera høvuðríkir. Tað ávirkar ikki meg persónliga, men jú, tað er undarligt at lesa, sigur Camilla Aradóttir.

Hon er tó bjartskygd, tá tað kemur til framtíðina.

- Eg vænti ikki, at tað fara at ganga nógv ár, til íslendingar reisa seg aftur. Eg havi eisini búð uttanlands, og íslendingar hava nakað serligt í sær. Verða vit blást um koll, so reisa vit okkum bara aftur og stríðast víðari, og soleiðis rokni eg við, at tað fer at ganga hesaferð eisini. Nú veit eg ikki, hvussu nógvar mánaðir ella ár vit tosa um, men vit fara at reisa okkum aftur, tað er vist, sigur Camilla Aradóttir.



# Verri fyri enn týskarar í 1918

**Worst Case Scenario kann fyri íslendingar merkja, at teir verða verri fyri, enn týskarar vóru eftir fyrra heimsbardaga, við uppbygging av landinum og krígsendurgjaldi omaná**

**Reykjavík:** Íslendsku bankarnir, sum hava latið deildir upp úti í Europa, hava bundið seg til eina innlánaratrygd, tær sonevndu Icesave-rokningarnar, sum tryggja hvørjum innlánara upp til 20.000 evrur, sum íslendski staturin sambært sáttmála við ES skal rinda.

- Vit vita ikki enn, hvussu stóra upphædd, vit tosa um fyri allar bankarnar í øllum londunum í Europa, sigur Kjartan Ólafson, altingslimur fyri Sjálvstæðisflokkin.

Stjórnin vónar, at tann eginkapitalurin, sum var í ymsu bankunum runt um í Europa, er nóg stórur, at rinda hesa trygdina.

- Men um ikki, so verður tað lagt á herðarnar á skattgjaldarunum her í Íslandi. Hvussu stór upphæddin er, vita vit einki um enn, men vit eru eitt sindur rædd fyri, at talan kann gerast um eina stóra upphædd, sigur Kjartan Ólafson.

Hann sigur, at Worst Case Scenario kann gerast, at tjóðin gerst enn skuldarbundnari enn Týskaland var eftir fyrra verðaldarbardaga, tá landið skuldi byggjast upp aftur, samstundis sum týskarar máttu rinda fyri krígsskaða.

- Men tað ber ikki til at leggja slíkar skyldur á íslendska fólkið, tí avleiðingin av hesum verður, at tað unga fólkið flytir av landinum og kemur ikki aftur, sigur Kjartan Ólafson.

### Gordon Brown skurkurin

Men her er veruliga talan um allar ringasta útfall av kreppuni.

- Men kemur tað so langt, er tað enski forsætismálaráðharrin, Gordon Brown, sum hevur skuldina, við at brúka eina anti-terror lóg til at innifrysta aktiv hjá íslendskum bankum í Onglandi, sigur Kjartan Ólafson.

Hann heldur, at Gordon Brown við ger sínari hevur stemplað íslendingar sum eina brotsmannatjóð.

- Forsætismálaráðharri okkara, Geir Haarde, hevur eisini úttalað seg um, at neyðugt verður at hyggja nærri at, um tað yvirhøvur er lógligt tað, sum Gordon Brown hevur gjørt, sigur Kjartan Ólafson.

Hann útilokar als ikki møguleikan fyri, at Gordon Brown verður drigin fyri ein altjóða dómstól at standa til svars fyri sínum gerðum.

- Eg dugi ikki at siga, hvat næsta stigið verður í hesum málinum, men tað hevur verið ført fram í Altinginum í dag, at vit eiga at kanna hetta málið við atliti til at fáa Gordon Brown at standa til svars fyri tí, hann hevur gjørt, sigur ein harmur Kjartan Ólafson.


*Íslendingar eru rættiliga fortørnaðir inn á enska forsætismálaráðharran, Gordon Brown, og vilja hava hann fyri ein altjóða dómstól*